**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein og Uni Holm Johannesen

# POLITISKAR LEGENDUR FARA HEIM

SEINASTU **20** ÁRINI HAVA **TEIR** VERIÐ TVEIR AV **STERKASTU** OG MEST **MARKANTU POLITIKARUNUM** Í FØROYUM. NÚ HAVA **ANFINN KALLSBERG** OG **JÓANNES EIDESGAARD** VIÐ **STUTTUM** MILLUMBILI **BOÐAÐ** FRÁ, AT TEIR **GEVAST** Í POLITIKKI. VIT HAVA **SPURT** POLITIKARAR OG **VIÐMERKJARAR**, HVAT TAÐ **MERKIR** FYRI FØROYSKAN **POLITIKK**

Samanlagt hava teir verið løgtingsmenn í meira enn 50 ár, teir hava verið løgmenn í 12 ár, og teir hava verið landsstýrismenn í 12 ár. Teir hava í nógv ár havt leiðsluna í sínum flokkum, hava flutt týðandi brikkar í føroyska samfelagnum og hava havt stóra undirtøku millum fólk.

Men nú hava teir sett punktum fyri sínar politisku karrierur.

Anfinn Kallsberg og Jóannes Eidesgaard gevast nú í politikki.

Fáir politikarar hava seinastu 20 árini havt vald, sum teir báðir hava havt, og nú teir takka fyri seg, skulu bæði flokkarnir hjá teimum og politiski heimurin venja seg við ein gerandisdag uttan tveir av sterkastu politikarunum í Føroyum í nýggjari tíð.

### Nú er nóg mikið

Anfinn Kallsberg, sum er 63 ára gamal, var fyrstu ferð valdur í løgtingið 1980.

– Einasti tinglimur, sum tá sat og sum enn er eftir, er Óli Breckmann. So hóast eg ikk meti meg sum gamlan, so eri eg gamal í politikki, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann segði, tá ið avgerðin um at gevast í politikki kom fram, at hann vildi gevast, meðan hann sjálvur kundi finna hurðina.

Jóannes Eidesgaard rundar 60 í apríl mánaði, og hann var fyrstu ferð valdur í løgtingið í 1990.

– Hetta er ein avgerð, sum hevur spøkt leingi, og nú var passaligur politiskur friður til at boða frá, at eg gevist, segði Jóannes Eidesgaard á tíðindafundi fyri viku síðani.

Harvið hava teir báðir politikararnir, sum vóru løgmenn í Føroyum frá 1996 til 2008, takkað fyri seg.



## Jóannes Eidesgaard

**Aldur:** 59 ár
**Bústaður:** Tvøroyri
**Flokkur:** Javnaðarflokkurin
**Løgmaður:** 2004-2008
**Landsstýrismaður:** 1991-1996, 2008-2011
**Løgtingsmaður:** 1990-2011



## Anfinn Kallsberg

**Aldur:** 63 ár
**Bústaður:** Viðareiði
**Flokkur:** Fólkaflokkurin
**Løgmaður:** 1996-2004
**Landsstýrismaður:** 1983-1985, januar-juni 1989 og 1996-1998
**Løgtingsformaður:** 1991-1993
**Løgtingsmaður:** 1980-2011

## Kann broyta politikkin

### Kaj Leo Johannesen

**løgmaður**



Tað er ikki av ongum, at Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg hava fingið tað vald, sum teir hava havt. Teir hava dugað sítt politiska handverk, og teir hava eisini verið seriøsir. Eg veit ikki um, at teir eru farnir út við persónligum álopum, teir hava hildið seg til málini, og tí er stór virðing um teir.

Eg eri uppvaksin við at lurta eftir teimum eldru, og í politikki havi eg eisini roynt at lært av teimum, sum hava meira royndir enn eg, og eg havi lært nógv av Jóannesi Eidesgaard og Anfinni Kallsberg.

Eg havi eisini stóra virðing fyri teimum, tí teir hava sitið í stólinum, sum eg siti í, og eg veit, at hetta er ein trupul stólur at sita í.

Nú teir gevast í politikki, verður størri rásarúm hjá yngri politikarunum, og tað fer helst at broyta politikkin nakað. Tað kann eisini broyta okkurt í samstarvinum millum flokkarnar, tí tá ið tveir politikarar hava sitið við valdið so leingi, so hava tað eisini verið onkrar gnidningar, og tað kann eitt skifti broyta.

Tað er eitt sindur sorgblítt, at teir nú gevast, tí eg havi samstarvað nógv við teir og eri komin at kenna teir sum politikarar og menniskju.